# Yvir hundrað mans á fundi

**Í 1972 møttu yvir 100 mans á fundi hjá Samfylking í húsinum hjá Arbeiðsmanna-felagnum**



*Hendan myndin er tikin um ta tíðina tá ið Samfylking bleiv stovnað í 1957. Hýruvognar hjá Taxa 1313 standa niðanfyri Kommunuskúlan, sum er spildurnýggjur. Leggið til merkis Taxa skeltið á húsinum uttast høgrumegin*

*Myndeigari Páll Hellu*

Umstøðurnar hjá teimum ið livdu av at koyra hýruvogn vóru út av lagi vánaligar.

Til dømis kostaðu hýruvognar tað sama at keypa sum privatbilar. Munurin millum tollin á hýruvognum og privatbilum varð so afturgoldin yvir tvey ár, treytað av at eigarin kundi prógva at høvuðsinntøka hansara var frá hýruvognskoyring.

Fyrst í 70-unum vóru fimm bilstøðir í Havn, tær vóru: Ringbil, Auto, Bil, Akstur Bil og Mini Taxi.

Í 1972 varð kallað saman til fundar í Arbeiðsmanna-felagshúsunum, har ætl-anin var at endurstovna »Bilstjórafelagið Samfylk-ing«.

Á fundinum møttu so gott sum allir ið tá koyrdu hýruvogn í Havn, umleið hundrað mans. Semja var um at endurstovna felagið og at velja nevnd, so felagið aftur kundi fáast at virka. Tey málini, ið mest varð tosað um, vóru: tollurin á hýruvognum, takstirnir, nýggj lóg fyri koyring við ferðafólki móti gjaldi.

Nýggj nevnd varð vald. Teir vóru: Justinus Háskor, Petur Clementsen, Eyðálvur Johannesen, Álvur Kirke og Hildebrand Midjord. Nevndin skipaði seg við Álvi Kirke sum formanni.

**Hýruvognarnir í verkfall**

Fyrsta takið var at fáa samband við myndugleikarnar, tí frammanundan høvdu teir gjørt nýggja lóg um vinnuligan fólkaflutning og hækka tollin á hýruvognum, uttan at ráðføra seg við vinnuna.

Landsstýrið hevði t.d. gjørt eina kunngerð um hýruvognar, har kravt varð at teir skuldi hava skelti á takinum og eina lykt omaná hvørjum forskermi. Hesar lyktir vórðu kallaðar mjólkarblikk.

Nevndin í Samfylking arbeiddi í tøttum samstarvi við allar teir sum koyrdu hýruvogn. Ein nevndarlimur frá hvørjari av teimum fimm bilstøðunum í Havn. Skeltið á takinum kundu teir flestu nokk góðtaka, men mjólkarblikkini vildi eingin hava.

Teir hildu tað vera heilt burtur úr vón og viti, at teir skuldu koyra við »reklamulyktum« hjá Taxa í Keypmannahavn.

Men eftir nakrar fundir við landsstýrið, har teir fingu nei til alt, gjørdu limirnir í Samfylking av at fara í verkfall. Allir hýruvognarnir í Havn stóðu stillir í ein dag fyri at vísa teirra ónøgd.

Nevndin arbeiddi annars fyri at regulera takstirnar og gjørdi eitt miðvíst arbeiði við at máta vegalongdir og at gera rímiligar takstir.

Tað var um hesa tíðina at »Bilstjórafelagið Samfylking« broytti navn til »Akstursvinnufelagið Samfylking«.




*Mazda 929L frá 1978 hjá Eivind Lilå. Landsstýrið gjørdi eina kunngerð um, at allir hýruvognar skuldu hava skelti á takinum og eina lykt omaná hvørjum forskermi*

**Í gerðabókini hjá Samfylking setndur: Hin 7. sepetmber 1972 varð innkallað til fundar í Arbeiðsmannfelagsins húsum við tí endamáli at endurreisa bilstjórafelagið Samfylking. Hetta varð samtykt, og vóru hesir bilstjórar møttir og gjørdust limir í felagnum:**

Hans A. Petersen,
Álvur Kirke
Hildebrand Midjord
Heðin í Dali
Henry Jarnskor
Helmuth Clausen
Hanus Lind
Henning M. Johannesen
Andrew Djurhuus
Arnhold Fjallstein
Flemming í Gong
Sofus Joensen
Torkil V.Hansen
Henning Petersen
Óla Kristian Jacobsen
Hans Olsen
Ib Poulsen
Poul Jensen
Jens Andersson
Åge Udbø
Árni Wang
Jógvan Joensen
Axel í Skorðastovu
Ámundur Vesturklett
John Nielsen
Sandrin Müller
Arne Hammer
Andreas R. Samuelsen
Niels Olsen
Rógvi Hansen
Gorm Simonsen
Osmund Joensen
Hans Pauli Danielsen
Helgi Sivertsen
Ansgar Jensen
Allan Mc.Intosh
Heri Midjord
Niclas Kjærbo
Niels Persson
Hans Nybo
Hans A. Davidesen
Jógvan Danielsen
Magnus Fuglø Jacobsen
Leo Viðbjørg
Páll Jensen
Ove Låberg
Justinus Háskor
Johan Simonsen
Niels Joensen
Folmer Jørgensen
Helgi Skorá
Martin Nielsen
Eli Rubeksen
Hergar Kjærbo
Julian Eliasen
Ólavur Arge
Emil Joensen
Hjalmar Jacobsen
Henning Thomsen
Dánjal Poulsen
Jákup Andreas Mohr
Jógvan Andreasen
Sjúrður Durhuus
John M. Holm
Dion Splidt
Bjarki Højgaard
Yarmouth Mellemgaard
Sámal J.Petersen
Jón B. Jensen
Jógvan Rasmussen
Christian Jensen
Óli Frits Jacobsen
Hans Dølum
Andreas Røsvik
Pauli Danielsen
Petur Clementsen
Mallius Hansen
Eyðálvur Johannesen
Kaysten Andreasen
Arne Berg
Sverri Djurhuus
Jens Petur Egholm
Mourits K. Mouritsen
Finnbogi Jensen
Magnus Egholm
Åge Egholm
Áslakkur Jakobsen
Karl Hansen
Ove Dam
Harry Skoradal
Andrias Jørgensen
Robert S.Christie
Eyolf í Stórustovu
Bjørgheðin Jacobsen
Høgni Danielsen
Jacob W.Andreasen
Mogens Wraae
Jentoft Kristensen
Páll Poulsen
Poul Djurhuus
Magnus Borðoy
Mourits Reynheim
Eyðbjørn Joensen
Gustav R.Samuelsen
Marius Jensen
Otlev Jensen
Johannes Funn

Hesir hýruvognsførarar, sum vóru við á fundinum, eru nokk teir flestu sum koyrdu hýruvogn í Havn fyri 35 árum síðan.